# Gerhard førir ikki sosialdemokratiskan politikk

**Javnaðarmaðurin Gerhard Lognberg er ímóti, at samkynd skulu arbeiða sum lærarar og pedagogar. Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, sigur, at hetta als ikki er sosial-demokratiskur politikkur, og at avleiðingin av, at Løgtingið feldi uppskotið um at seta diskriminatión av kynsligari orientering í revsilógina er, at nú ber til at siga alt um samkynd**

FLOKSÓSEMJA
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Kjakið um rættindini hjá samkyndum í Føroyum gongur enn heitt, og hevur í seinastuni eisini ment seg til at fevna um talu- og skrivifrælsi, men eisini um rættindini hjá samkyndum til at arbeiða í ávísum vinnum.

Stutt fyri jól skrivaði Mogens Tilsted Christensen, prestur í Hvalvík, í lesarabrævi:

"Det menneske, som ønsker at udøve sin homoseksualitet, må påtage sig andet arbejde end at være lærer eller pædagog. Mennesker er normalt udstyret med evner til at kunne arbejde med mange ting. Man sætter jo ikke ræven til at vogte høns".

Presturin varð meldaður, men fútin metti ikki, at grundarlag var fyri at reisa ákæru.

Í lesarabrævi skrivar tinglimur Javnaðarfloksins í Sandoynni, Gerhard Lognberg, at hann tekur undir við hvalvíkarpresti.

"Sum er, siti eg í einum skúlastýri. Um ein lærari ella pedagogur skrivaði í umsóknini, at hann var samkyndur, ofta siga fólk eitt sindur um seg sjálvan í eini umsókn. Hevði hann ella hon einki sagt, ja, so visti man ikki hvat og hvussu. Eg hevði sagt nei at sett viðkomandi, um eingin annar søkti", skrivar Gerhard Lognberg m.a.

### Relevant at spyrja, um floksdisciplin er undanførsla

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevur í sínari starvstíð sum løgmaður hildið røðu á tiltaki hjá Friðarboganum og nevnt samkynd í síni seinastu nýggjársrøðu.

Spurdur, hvat hann sum formaður Javnaðarfloksins heldur um sjónarmiðini hjá sínum partamanni, sigur hann, at vit í føroyskum politikki hava sum siðvenju, at geva teimum einstøku tinglimunum frælsi til at taka persónliga støðu í sonevndum etiskum og moralskum spurningum.

Tá hann síðani verður spurdur, um tað í longini ikki er ov bíligt í longdini at hava sum undanførslu, at føroyskir politikarar skulu hava frælsi í sonevndum etiskum spurningum, og at ein á hendan hátt sleppur undan at taka støðu í flokkunum, sigur løgmaður, at hann metir spurningin vera relevantan, men at hetta verður praktiserað í flest øllum flokkum, og sipar m.a. til sambandsmenninar Kaj Leo Johannesen og Alfred Olsen, og tjóð-veldismenninar Høgna Hoydal og Karsten Hansen, sum eins og hann sjálvur og Gerhard Lognberg ikki eru samdir innanfloks um, hvørji lógarfest rættindi samkynd skulu hava í Føroyum.

– Men eg eri eins og øll onnur noyddur til at taka avgerðina hjá Løgtinginum til eftirtektar, sigur Jóannes Eidesgaard.



*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins er ikki samdur við tingliminum Gerhard Lognberg.*

### Ímóti at avmarka vinnumøguleikarnar

Javnaðarformaðurin sigur hinvegin, at avleiðingarnar av, at Løgtingið ikki vildi útbyggja antidiskriminatións-paragraffina, so at hon eisini kom at umfevna kynsliga orientering, er, at nú ber til at siga, hvat ein hvat hevur hug til um samkynd, og at tað eisini bleiv ávarað ímóti hesum, áðrenn hvalvíkarprestur byrjaði at mótmæla, at samkynd fáa størv sum lærarar ella námsfrøðingar.

– Hevði tað sama verið sagt um ein asiat ella afrikanara, hevði tað fingið avleiðingar, men tað fær tað ikki í hesum førinum, sigur Jóannes Eidesgaard um útsagnirnar hjá Mogens Tilsted Christensen og Gerhardi Lognberg.

– Persónliga eri eg ímóti at avmarka vinnumøguleikarnar hjá fólki, og sæð út frá einum sosialdemokratiskum sjónarmiði, er hetta púra í andsøgn við tað.

– Vit hava ikki viðgjørt hetta í flokkinum, men eg meti, at floksins støða sum heild liggur nærri at mínum sjónarmiðum enn teimum hjá Gerhardi, sigur Jóannes Eidesgaard

Hvalvíkarprestur varð meldaður fyri síni orð, men um Gerhard Lognberg verður meldaður, skal Løgtingið, har meiriluti feldi uppskotið um antidiskriminatiónsparagraffina, fyrst taka órinið frá honum sum tingmanni. Spurningurin er eisini, um grundarlag er hjá fútanum at reisa ákæru, av tí at sama løgting ikki vildi samtykkja at skoyta diskrimination av kynsligari orientering upp í revsilógina.

# Stór útstykking á Velbastað

**Í næstum verður farið undir at gera eina stóra útstykking á Velbastað. Tað er velbastaðmaðurin, Jógvan Hans Østerø, ið fer at stykkja út ikki færri enn 29 grundøki til sethús.**

ÚTSTYKKING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar Býráð mánakvøldið samtykti nevndin at geva loyvi til at fara undir útstykkingina av Jákupstrøð, sum økið eitur, har útstykkingin skal gerast.



*ì næstum verður farið undir útstykkjan á Velbastað av ikki færri enn 29 grundøkjum.*
*Savnsmynd*

### Klárt móti sumri

Tað er Jógvan Hans Østerø, sum eigur trøðna, og hann sigur seg vænta, at væntandi fer arbeiðið í gongd um hálvanannan mánað ella so.

– Nú verður arbeiðið bjóðað út, og eg vænti, at um ein ella tveir mánaðar verður klárt at fara í gongd at útstykkja. Í fyrstu atløgu verður tað tann niðari parturin av útstykkingini, i8ð verður gjørdur og kanska eisini tann ovasti. Tað vil siga, at í fyrstu atløgu snýr tað seg um eini tíggju grundøki, sum væntandi verða tøk út móti sumri, greiðir Jógvan Hans Østerø frá.

Tá ið grundøkini verða seld, eru tey ikki byggibúgvin, men alt annað verður gjørt, sigur Jógvan Hans Østerø.

– Alt verður lagt til. Felagstangi verður, og kloakk, vatn og streymur verður lagt til. Ein vegur er til økið í løtuni við atkomu frá Gerðisbreyt, men Tórshavnar Kommuna fer eisini at gera ein vegastubba upp á umleið 100 metrar, so at útstykkingin verður bundin í Stórheygg, sigur Jógvan Hans Østerø at enda.

## Smávegis snuddir í tunlinum

**Klaksvík:** Seint í gjárkvøldi rendi ein bilur inn í veggin í Árnafjarðartunlinum. Bilurin fekk stóran skaða, men førarin slapp við smærri snuddum.

Maðurin var einsamallur í bilinum ávegis til Klaksvíkar, tá óhappið hendi, upplýsir vakthavandi á Politistøðini í Klaksvík.

Bilurin er farin av vegnum og niður í ta einu grøvina í tunlinum, og koppaði síðani á takið og koma at liggja tvørt fyri í tunlinum.

Hetta steðgaði ferðsluni í 1 1/2 tíma, inntil ein lastbilur við krana hevði togað bilin úr tunlinum aftur.

Aftaná komu menn frá Landsverki at rudda vegin, og síðani gekk ferðslan aftur sum vanligt.

**sb.**

## Venesuela í miðdeplinum

**Ebeneser, Havn:** Hóast stórar umbyggingar fara fram í hesum samkomuhúsinum, so er kortini nógv virksemi í húsinum. Kvøldið í kvøld er einki undantak í so máta.

Í kvøld verður nevniliga serligur dentur lagdur á Suðuramerikanska landið, Venesuela.

Á ungdómsmøtinum í kvøld verður luttøka av Bill og Sheila Meerstra úr Canada. Tey virka sum umboðsfólk fyri missiónsfelagsskapin New Tribes Mission í Canada.

Bill og Sheila hava verið á skúla saman við fleiri føroyskum trúboðarum, m.a. Símun í Túni, trúboðara í Venesuela og Ragnar Niclasen, trúboðara á Filipsoyggjunum. Bill hevur eisini undirvíst í mong ár á venjingarskúlanum hjá NTM í Canada.

Tey ferðast runt í landinum í hesum døgum, og greiða frá virksemi sínum.

Samstundis við hetta møtið hittast kvinnurnar í sama bygningi til eitt kvinnumøti, har Venesuela eisini er á skránni. Her fer føroyski trúboðarin, Erla Petersen í Venesuela at luttaka.

**sb.**